Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 03.11.2023
Mál nr.: 23/20623
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023**,** verða gjørdar hesar broytingar:
§ 25 b. Sum skattskyldug inntøka fyri arbeiði uttanlands verður bert roknað skattskyldug inntøka, sum hin skattskyldugi í inntøkuárinum hevur lagt inn í peningi ella peningsvirði uttanlands ella umborð á útlendskum skipi. 1. pkt. er tó ikki galdandi fyri samsýning fyri arbeiði uttanlands, sum kemur undir grein 15, stk. 4 í norðurlendska tvískattasáttmálanum. 1. pkt. er	§ 25 b verður strikað.

heldur ikki galdandi fyri sendifólk Føroya uttanlands. *Stk. 2.* Manningin á skipum, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS ella í Donsku Altjóða Skipaskránni DIS og í føroysku skipaskrásetingini annars, koma ikki undir reglurnar í stk. 1.	
12) Partur av meirútreiðslum til kost, húsaleigu, ferðir og flutning, sjúkra- og vanlukkutryggingar, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlondum ella umborð á útlendskum skipum, tó ikki inntøkur fevndar av § 25 b, stk. 1. Frádrátturin er treytaður av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið antin er 2 mánaðir uttan slit, ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaðar tíðarskeið. **Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir við kunngerð frádráttarupphæddina og neyvari reglur fyri, hvussu frádrátturin verður veittur. Frádráttirnir eftir hesum reglum kunnu tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan.**	Í § 33, nr. 12 verða 3. og 4. pkt. orðað soleiðis: "Frádrátturin, sum verður veittur sum ein samdøgursfrádráttur, kann tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan. Frádrátturin er í a) 2024: kr. 240. b) 2025: kr. 180. c) 2026: kr. 120. d) 2027: kr. 60."
12) Partur av meirútreiðslum til kost, húsaleigu, ferðir og flutning, sjúkra- og vanlukkutryggingar, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlondum ella umborð á útlendskum skipum, tó ikki inntøkur fevndar av § 25 b, stk. 1. Frádrátturin er treytaður av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands	§ 33, nr. 12 verður strikað.

innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið antin er 2 mánaðir uttan slit, ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaðar tíðarskeið. Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir við kunngerð frádráttarupphæddina og neyvari reglur fyri, hvussu frádrátturin verður veittur. Frádráttirnir eftir hesum reglum kunnu tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan.	
13) 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi kr. 120.000.	§ 33, nr. 13 verður orðað soleiðis: "13) 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi: a) Fyri 2024: kr. 96.000. b) Fyri 2025: kr. 72.000. c) Fyri 2026: kr. 48.000. d) Fyri 2027: kr. 24.000."
13) 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi kr. 120.000.	§ 33, nr. 13 verður strikað.
14% av veiðiinntøkuni og annað mangt, gjørt upp eftir § 25 a, stk. 3-6, tó ikki veiðuinntøka, sum eisini er fevnd av § 25 b, stk. 1. Tann parturin av inntøkuni frá fiskiskapi, sum er hægri enn 470.000 kr., verður ikki lækkaður.	§ 33, nr. 17 verður orðað soleiðis: "17) 14% av veiðiinntøkuni upp til: a) Kr. 400.000 fyri 2024. b) Kr. 300.000 fyri 2025 og fylgjandi ár."
§ 154 b. Tá tvískatting verður avtikin, verður avgjald, sum goldið til eitt annað land enn Føroyar og sum fevnt av norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd, talt við sum ein skattur, goldin í Norðurlondum.	§ 154 b verður strikað.